# ítróttur

Nr. 156 • leygardagur • 17. august 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo


## Ion Geolgau koyrdur



*HB-leiðslan hevur valt at seta Ion Geolgau úr starvi. Vánaligu úrslitini í seinastuni er orsøkin.*

*Savnsmynd*

**Vánaligu úrslitini í seinastuni er orsøkin til brádliga venjaraskiftið í HB**

FÓTBÓLTUR
*Páll Holm Johannesen*

HB-leiðslan hevði boðað til tíðindafund fríggjamorgunin. Umframt at sáttmáli við Nocko Jokovic varð undirskrivaður, so boðaði leiðslan í HB, at rumenski venjarin, Ion Geolgau, er settur úr starvið.

Orsøkin til brádliga venjaraskiftið, sigur leiðslan verða at nú mátti okkurt henda, um meistaraheitið ikki skuldi fella teimum av hondum. HB-leiðslan vildi eisini nýta høvið til at takka Ion Geolgau fyri tað, hann hevði gjørt fyri felagið, og at hetta var ein heldur keðiligur endi uppá eitt so annars gott samstarv.

Ion Geolgau vann greipuna fyrsta árið, hann var í HB, men síðani hevur gingið eitt sindur striltið. Tvær steypafinalur hevur hann tapt, og i 2000 fekk eitt annað pláss í føroysku landskappingini.

HB tapti á Ólavsøku steypafinaluna, og av seinastu seks dystunum, eru fýra taptir, og hóast felagið liggur bert eitt stig frá oddaliðnum NSÍ, so hevur leiðslan avgjørt at seta venjaran úr starvi.

### Eisini koyrdur í fjør

Ion Geolgau var eisini koyrdur í fjør, men tað gjørdist stokkut, tí eftir bert ein dyst, sat rumenin aftur á beinkinum hjá HB. Tá vóru tað serliga spælararnir, ið vóru ónøgdir við, at leiðslan hevði sett hann frá, og tí vendi hann aftur.

Hvussu spælarnir hava tað hesaferð, vildi leiðslan í HB ikki rættiliga svara uppá, men svaraði bert, at hetta var ein avgerð, sum leiðslan hevði tikið, og at bert einstakir spælarar á 1.liðið vórðu tiknir til ráðs.

Hvat nú hendir við Ion Geolgau er ilt at spáa um, men um hann velur at vera verandi í Føroyum, so er tað heilt vist, at hann gongur ikki arbeiðsleysur leingi, tí flest øll mugu ásannað, at rumenin er dugnaligur venjari.

### Kári Nielsen tekur yvir

Hjálparvenjarin hjá Ion Geolgau, Kári Nielsen, skal hava ábyrgdina av 1.liði restina av kappingarárinum. Hann er gamal í garði, og sambært leiðsluni hevði tað stóran týdning, at tað var ein sum kendi felagið, sum nú tók við róðrinum. Eisini vísti leiðslan í HB á, at Kári er vællýddur, og at spælararnir hava neyðugu respektina um hansara persón.

Mátin HB loysir venjara trupulleikarnir, líkjast ikki sørt tí, sum Brøndby nýtti fyrr í vár. Hóast liðið lá væl fyri, so varð eisini nýggjur venjari settur í úrtíð, og nú fer bara framtíðin at vísa um, tað fer gangast líka væl hjá HB, sum tað gjørdi hjá Brøndby fyrr í summar.

## Nocko Jokovic verður í HB restina av kappingarárinum



*Nocko Jokovic vil ikki útihýsa møgleikanum, at hann eisini verður í Føroyum komandi kappingarár*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Fríggjamorgunin varð so sáttmáli undirskrivaður millum Nocko Jokovico og Havnar Bóltfelag fyri restina av kappingarárinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

FÓTBÓLTUR
*Páll Holm Johannesen*

Umframt brádliga venjaraskiftið, so boðaði HB-leiðslan eisini frá, at danin Nocko Jokovic spælir í HB restina av kappingarárinum. Nocko Jokovic hevur verið í Føroyum í eina góða viku, og nú eru partarnir komnir ásamt um at gera ein sáttmála.

Atvoldin til at Nocko Jokovic er komin hendanvegin, sigur HB-leiðslan vera, at nú bæði Uni Arge og Pætur Dahl ikki vera at síggja á liðnum restina av kappingini, varð neyðugt við einum nýggjum manni álopinum, og tað er soleiðis sambandið millum partarnar er komið í lag.

Sjálvur sigur Nocko seg vera fegnan um sáttmálan, og at hann vónar at tað fer at ganga honum og nýggju liðfeløgunum væl, og vónandi, at hann kann vera við at fáa meistaraheitið í hús.

Nocko vísir eisini á, at honum nýtist tíð at venja seg við undirlagi og nýggju liðfelagarnar, men hann er sannførdur um, at tað skal fara ganga væl.

Spurdur um tað var hugsingur um, at hann spældi við HB komandi ár, svaraði Nocko, at um hann og familjan treivst væl, og at tað gekk væl í HB, so skuldi hann ikki útihýsa møguleikanum.

– Eg havi tó ikki slept vónini um at sleppa at spæla á høgum stigi uttanfyri Danmark, segði Nocko eftir tíðindafundin.

Spurdur um hvørja fatan hann hevði av føroyskum fótbólti, nú hann hevði verið her í eina viku, segði Nocko Jokovic, at støði avgjørt er lægri enn eitt nú í superliguni, men tað hevði hann eisini vænta frammanundan. Hann hevði tó ikki væntað at so nógvir góðir fótbóltsspælarar vóru í Føroyum, og tað var bara gleðiligt fyri føroyskan fótbólt

Um nýggja felagið HB, segði Nocko Jokovic, at felagið hevði allar neyðugu hentleikar, og at leiðsla og spælarar høvdu verið sera fyrikomandi, og hann gleddi seg til at koma í gongd við at spæla fótbólt aftur.

Nocko Jokovic hevur ikki spælt tað stóra seinasta árið, hann hevur verið knýttur at skotska felagnum Livingston, men hevði torført við at fingið spælitíð, so sáttmálin við HB var fyrst og fremst gjørdur við tí fyri eyga at koma í gongd aftur við fótbóltinum.



## Føroyingar stóðu seg væl í Lyngby

*Tíðindaskriv*



*Føroysku luttakararnar í Lyngby Ungdoms Games: fv. Esther Rasmussen, Marin í Dali, Álvur F. Christiansen, Tróndur Kragesten og Jan Elmar Sørensen*

Seinasta vikuskifti vóru fimm ungir føroyingar og royndu seg í altjóða kapping í frælsum ítrótti í Danmark. Og úrtøkan var góð: 2 gull-, 1 silvur- og 2 bronsuheiðursmerki.

Kappingin nevndist Lyngby Ungdoms Games og varð hildin sunnudagin. Føroysku luttakararnir í Lyngby Ungdoms Games vóru vinnararnir av Grand Prix kappingini í renning: Esther Rasmussen og Marin í Dali av Tvøroyri, Tróndur Kragesten úr Havn og Álvur F. Christiansen úr Klaksvík. Umframt hesi tók Jan Elmar Sørensen úr Klaksvík eisini lut í kappingini.

Føroyska luttøkan er fingin í lag við stuðli frá Norðurlendska Ráðharraráðnum.

Umstøðurnar voru góðar at kappast, hóast tað var heldur heitt fyri føroyingarnar á rennibreytini, eini 25 stig, sól og stilli. Men føroyingarnir fingu øll heiðursmerki við sær heim.

Esther Rasmussen rann 400m og 1500m. Á 400m gjørdist hon nr. 4 við tíðini 70,31 sek. Hetta var nýtt bólkamet fyri gentur-14 og samstundis bert tvey sekund frá føroyska metinum á teininum. Á 1500m vann hon silvurheiðursmerki við tíðini 5.59,90 min.

Marin í Dali royndi seg á 80m og 800m. Á 80m var hon miskeiðis í rúgvuni við tíðini 12,27 sek. Betri gekk á 800m. Har vann hon bronsumerki við tíðini 2.35,34 min. Tá tær høvdu runnið hálva leið, lá Marin annars á odda. Tíðin hjá henni var nýtt bólkamet fyri gentur-13 og samstundis næstbesta føroyska tíðin á teininum yvirhøvur.

Tróndur Kragesten rann 400m og 1500m. Á 400m vann hann sín bólk við tíðini 56,48 sek. Hetta rakk til eitt samlað fjórða pláss. Men leiðarin á ferðini, Guttorm Sørensen, metir, at um Tróndur var styrkismettur hægri og tískil hevði runnið í hinum bólkinum, so hevði hann vunnið eitt heiðursmerki á

400m. Á 1500m gjørdi Tróndur bart. Hann førdi allan vegin og vann við tíðini 4.56,16. Hetta var sjey sekund betur enn silvurvinnarin. Tróndur setti samstundis nýtt bólkamet fyri dreingir-15.

Álvur F. Christiansen luttók á 80m og 800m. Á 80m fekk hann tíðina 12,49 sek., meðan hann vann bronsu á 800m við 2.34,56 min. Hetta var nýtt bólkamet fyri dreingir-13.

Jan Elmar Sørensen luttók á 50m og 800m. Á 50m fekk hann tíðina 11,05 sek. Á 800m vann Jan Elmar við 2.53,16 min., ið eisini er nýtt bólkamet fyri dreingir-11.

Føroyska sersambandið fyri frælsan ítrótt, FÍF, er sera væl nøkt við føroysku úrslitini. Tey ungu hava víst eldhug í kappingunum her heima í summar, og tey vístu í vikuskiftinum, at tey eisini kunnu gera seg galdandi í altjóða kapping.

Tó undirstrikaði føroyska luttøkan enn einaferð, at stórur tørvur er á økjum til frælsan ítrótt kring landið. Føroysku luttakararnir stóðu seg væl á longru teinunum, men á teimum meiri tekniskt krevjandi stuttu teinunum stóðu tey seg ikki eins væl. Atgongd til rennibreyt er neyðug, um ein skal menna seg á longu teinunum. Men á stuttu teinunum ber snøgt sagt ikki til at venja uttan atgongd til rennibreyt. Støðan við bert einari rennibreyt í Føroyum er serliga harmilig, tá hugsað verður um tey umleið 500 børnini og ungu, ið, nú kappingarárið er hálvrunnið, hava tikið lut í rennikappingum kring landið í ár.

## Todi bjargaði FCK

UEFA CUP
*Páll Holm Johannesen*

Við tveimum málum frá Toda Jónsson, eydanaðist FCK at vinna 3-1 ímóti Lokomotivi Tblisi hóskvøldið í Parkini. Gestirnir úr Georgia komu annars á odda í fyrra hálvleiki, men stutt fyri hálvleik, var føroyingurin á plettinum, og fekk javna.

Í seinna hálvleiki var FCK nógv betri, og høvdu fleiri málmøguleikar. Áðrenn 10 minuttir vóru farnir av seinna hálvleiki, so høvdu FCK vunnu seg uppá eina 3-1 leiðslu. Toda skeyt sítt annað mál, meðan Thomas Røll fekk hitt. Málmøguleikar vóru eisini til fleiri mál, men FCK mátti taka til takkar við einum 3-1 sigri.

FCK kann vænta sær torføran dyst í Georgia, har 2-0 til georgiska liðið er nóg mikið at senda FCK úr kappingini

### Todi fegin um málini

Todi segði við heimasíðun hjá Onside, at hann var fegin um málini, tí kappingini er sera hørð um plássini í álopinum hjá FCK. Hósdagin vóru tað Todi og sviin Jørgen Pettersson, sum byrjaðu, meðan Peter Møller aftur sat á beinkinum. Zuma er skaddur, og var tí ikki við í Parkini.

Todi lat ikki væl at spælinum hjá FCK, men væntaði kortini at FCK kláraði at koma víðari í kappingini.



*Todi Jónsson bjargaði FCK hóskvøldið í UEFA Cup- kappingini ímóti Lokomotivi Tblisi*

*Savnsmynd*

## GÍ tapti í Split

HAJDUK SPLIT-GÍ
*Páll Holm Johannesen*

GÍ var hóskvøldið á torførari uppgávu í Split. Kroatiska stórfelagið vann dystin 3-0, eftir hálvleikstøðuna 1-0. Okkum hevur ikki eydnast at fingið samband við GÍ-leguna, og tí er ikki okkum greitt, hvussu leikur fór fram í Split.

Einasta, vit vita er, at endaliga úrslitið gjørdist 3-0, og á heimasíðuni hjá UEFA stendur ikki meir enn hvør hevur skotið málini hjá heimaliðnum.

**Dysturin í tølum:**

Hajduk Split-GÍ 3-0 (1-0)
1-0 Dolonga
2-0 Pletikosa (br)
3-0 Dranja

**Gí:** Hallur Hansen, Bartal Eliassen, Pól Ennigarð, Leivur Hansen, Súni Olsen, Jóan Petur Olsen( Áslakkur Petersen), Magni Jarnskor (Gidek Janik), Hans Pauli Petersen, Kryzstof Popczynski(Súni Fríði Johannesen), Henning Jarnskor.



*Gí tapti ikki heilt óvæntað ímóti Hajduk Split*

*Savnsmynd*